

**Navn:**
Katrin M. Einarsson

**Hvaðani ert tú:**
Úr Trongisvági

**Hvat lesur tú:**
Eg lesi Illustration (BA) hons

**Hvar lesur tú:**
í Blackpool í Onglandi

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Skúlin eitur Blackpool and the Fylde College, og hann samarbeiðir við Lancaster universitety, so tað er møguligt at fáa universitets útbúgving. Tað koma 30.000 næmingar hvørt ár, og harav eru gott og væl 1500 undir hægri útbúgving. Næmingarnir eru í øllum aldursbólkum frá 14 til 60+.

Tað er ymiskt, hvussu nógvir næmingar eru í hvørjum flokki. Vit eru bert 8 næmingar, meðan aðrir flokkar hava yvir 20 næmingar.

Lærararnir eru fyrikomandi, vinarligir og sera hjálpsamir.

Skúlin letur hvørjum næmingi eitt næmingakort, sum gevur atgongd til bókasavnið og teldurúm.

Skúlin bjóðar harumframt nógv ymisk tiltøk, so sum at hitta persónar, sum eru kend innan tey ymisku fakini. Tey hava eisini nógvar nýggjar teknikkir at skapa list t.d. at tekna við ljósi. Skúlin vísir á møguleikar og stuðlar okkum í at luttaka í kappingum, t.d. í at designa reklamur fyri stórar fyritøkur.
Í fyrsta semestrið verður størsti dentur lagdur á kunning og nýtslu av ymiskum media og útgerð. Hetta er sera áhugavert og eg læri nógv nýtt hvønn dag.

Nærri upplýsingar kunnu finnast á www.blackpool.ac.uk

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Lesnaðurin er ikki strævin, men eg eri bara á fyrsta ári enn. Eg eri í skúla fimm dagar um vikuna, men tað er ymiskt hvussu tíðirnar eru, onkuntíð fyrrapart og onkuntíð seinnapart. Til ber at sita á skúlanum til kl 20.00, men situr tú við eini uppgávu, eru tey lagalig.

Her eru næmingar úr øllum londum, umleið 40% frá útheiminum og 60% úr øllum Onglandi. Í mínum flokki eru tað eg og ein genta úr Mexico, sum ikki eru bretskar. Tað eru heilt ótrúliga fá fólk, sum vita hvar Føroyar eru, og nógv halda eg eri pólsk, rumensk, írsk ella amerikonsk, tá eg snakki. Haldi, eg havi møtt 3 fólkum sum vita hvar Føroyar eru. Tað er stuttligt, tá fólk spæla klók og svara, "jú jú eg veit, hvar Føroyar liggur, tað er ein oyggj við Egyptaland".

Aftaná skúlating og skúlatíð er nokk at fara til. Her er Coral Island, sum er pinnpakkað av spæli-maskinum, og har er eisini bingo. So er Sea life, Zoo, South-, Central- og North-pier við parisarahjóli, eini elli gamlari carousell, bowling o.m.a. Her er eisini størsta "forlystelsepark" í Norðuratlantshavinum, sum eitur Pleasure Beach.
Náttarlívið her er ikki sum heima. Fólk koma til Blackpool fyri at halda føðingardag ella polterabend, men tað er mest leygardagar. Næmingarnir fara fyri tað mesta út tórskvøld. Ofta hevur 3. flokkur temaveitslur, sum tey halda fyri at samla pengar inn, so tey kunnu hava framsýning av teirra seinastu verkum. Her eru nógv dansistøð og barrir síð um síð, so um eitt stað stongir so fer man til næsta stað. Tað er sum oftast opið til kl 3-4 um náttina, og her fer man út um 20-22 tíðina.
Tey siga at Blackpool er Las Vegas í Onglandi.

**Hvørjir fyrimunir og vansar eru við at lesa har, tú ert:**
Tað er ongin møguleiki at læra innan list á hægri støði í Føroyum. Tí valdi eg útlandið. Eg metti møguleikarnir í Onglandi vóru betur, bæði listarliga og málsliga, og kundu geva mær møguleika at koma víðari út í heim.

Ein fyrimunur við skúlanum er eisini at man fær hjálp til alt, lærararnir eru saman við okkum 4-8 tímar um vikuna.

Vansin er, at man er so langt heimanífrá, men tá er gott at kunna tosa við og síggja familju og vinir yvir Skype ella MSN.

Eg eri 25 ár, búgvi í einum húsi mitt í Blackpool saman við trimum øðrum, sum eisini ganga á sama universiteti. Tað tekur umleið 10 min at ganga til universitetið og umleið somu tíð til miðbýin.

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*




**Hvussu eitur tú?**
Karin Háskor

**Hvaðani ert tú?**
Úr Tórshavn

**Hvat lesur tú?**
Sálarfrøði

**Hvar lesur tú?**
University of Western Sydney, Avstralia.

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan?**
Á skúlanum ganga á leið 35.000 næmingar, sum so at siga eru úr øllum heiminum. Tískil er skúlin nógv merktur av tí fjølbroytni, sum ymisku mentaninar føra við sær.

Karmarnir, sum skúlin veitir næmingunum, eru nútímans og góðir. Hetta inniber millum annað, at samskifti millum næmingar og lærarar er gott, og at hentleikar – so sum atgongd til bókasavn, alnótina og lesiøki – eru góðir.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið?**
Hóast lestrarlívið er sera strævið til tíðir, so eru tað eisini nógvar hugnaligar og stuttligar løtur. Av tí, at so nógv fólk eru savnað á einum stað, so gerst lestrarumhvørvið sera livandi, har nógvir spennandi aktivitetir fara fram. Skúlin veitir ikki bara nútímans karmar, tá tað kemur til sjálvan lesnaðin, men eisini tá tað snýr seg um trivnaðin millum næmingar. Tað verður skipað fyri nógvum tiltøkum, so sum skeiðum í at læra at surfa, skíferðum, dagstúrum til aðrar býir, veitslum o.a. Eisini verður nógv gjørt burtur úr ymiskum ítróttargreinum og kappingum.

**Fyrimunir og vansar við at lesa har tú ert?**
Persónliga haldi eg, at tað eru fleiri fyrimunir enn vansar við at lesa í Sydney. Eg haldi, at tað er sera jaligt, at eg sum føroyingur havi so góðar møguleikar at fara út um Føroyar og Danmark at útbúgva meg. Hetta ger, at eg kann fáa innlit í hvussu onnur samfeløg eru uppbygd, og ikki minst hvussu mítt fakøki verður skipað í Avstralia í mun til her heima. Av tí sama kann eg vónandi, eftir loknað útbúgving, koma heim við einum øðrvísi



ískoyti, sum kann vera við til at skapa fjølbroytni innan økið.

Tað er eingin loyna, at veðurlagið stendur frammalaga á listanum yfir hvat fyrimunum viðvíkur. Veðrið er gott bæði um summarið og veturin. Harafturat hevur ein óteljandi møguleikar at vitja ymisk støð, bæði í Avstralia og øðrum londum í Avstralasia. Men Avstralia er langt heimanífrá, og tí vil ein vansi sjálvsagt vera kostnaðir og langa frástøðan millum Føroyar og Avstralia.

---

**Hvussu eitur tú:**
Ólavur Ólavsson

**Hvaðani ert tú:**
Hoyvík

**Hvat lesur tú:**
Cand.merc. innan altjóða handil

**Hvar lesur tú:**
Eg lesi vanliga á Copenhagen Business School (CBS), men eri stutt síðani afturkomin úr Prag, Tjekkia, har eg havi tikið eitt semester.

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Skúlin eitur Vysoká škola ekonomická (VSE) og er tann fremsti innan leiðslu og búskap í Tjekkia. Tað eru umleið 15.500 lesandi og 1.000 starvsfólk knýtt at skúlanum. Í høvuðsheitum verður undirvíst á tjekkiskum og enskum, men tað finnast eisini spennandi valgreinar á týskum, fronskum og russiskum, um áhugi er fyri tí.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Eg væntaði ein fornan eystureuropeiskan undirvísingarhátt, men á mangar hættir minti bygnaðurin og undirvísingarhátturin um tað, eg var vanur við á CBS. Undirvísingin var latin við stórum fyrilestrum (uml. 150 næmingar) og smærri fyrilestrum (umleið 25 næmingar). Eisini høvdu vit bólkaarbeiði og løgdu ofta fram. Tað var møtiskylda, men ógvuliga ymiskt, hvussu álvarsamt undir-



vísararnir tóku tað.

Tað komu ofta køn fólk uttanifrá at halda fyrilestur fyri okkum. T.d. var eg til ein fyrilestur um altjóða fíggjarkreppuna, ið forstjórin í bankanum Ceska Sporitelna helt. Og eisini til ein um retorik, PR og Obama, sum eitt umboð fyri amerikonsku sendistovuna stóð fyri.

Støðið og krøvini eru uttan iva hægri á CBS enn á VSE. Sum dømi kann nevnast, at tey á VSE hava nøkur sokallað intensiv skeið, har tú uppá tveir dagar kanst tjena líka nógv ECTS stig, ið vanliga taka 2-3 mánaðar at tjena á CBS.

Á sosiala frontinum var skipað fyri einari ørgrynnu av ymiskum tiltøkum hvørja viku. T.d. veitslur fyri øllum skúlanum og útferðir í Tjekkia og grannalondunum.

**Fyrimunir og vansar av at lesa har tú vart:**
Eg valdi at fara til Prag, tí mín útbúgving tekur útgangsstøði í altjóða marknaðinum, og harvið er henda uppliving við til at styrkja mína útbúgvingarligu vangamynd. CBS hevur samstarv við fleiri enn 370 líknandi skúlar kring knøttin og tað er rættiliga líkatil at sleppa avstað. At uppliva eina øðrvísi mentan víðkar um sjónarringin og gevur sjálvsagt dygga vitan um vitjaða landið, men tað gevur tær sanniliga eisini eina øðrvísi sjón á títt egna land. Nakað, tú ikki kanst læra í nakrari bók.

Prag er ein ótrúliga vakur og hugnaligur býur. Har er rættiliga bíligt at liva, serliga tá ið tú hevur SU við heimanífrá. Tó eru gøturnar rundan um Gamla Torg og Karlsbrúnna ein stór turistfella við sera høgum prísum. Býurin hevur eina rúgvu at bjóða á mentanarliga økinum, og tað er sera lætt at ferðast við metro, sporvogni og bussi.

Ein vansi er, at tey eldru ofta ikki skilja enskt, men í summum førum ber tað til at stama seg í gjøgnum á týskum. Tjekkar minna eitt sindur um føroyingar av lyndi, í nógvum førum torførir at koma inn á, men tá ið ísurin ordiliga er bráðnaður, kemur alt í senn.

Sum heild eru fyrimunirnir nógv fleiri enn vansarnir, og Prag kann avgjørt viðmælast sum lestrarbýur.